## Ráðharri í sex-skandalu

Malaysiski heilsumálaráðharrin er tikin við buksunum niðri – heilt bókstaviliga. Hann hevur viðgingið, at tað er hann, sum er á einum sex-video, ið nú er at finna um meginpartin av landinum. Tað var dagblaðið Star, sum avdúkaði mongu DVD'irnar, sum byrjaðu at verða spreiddar út í seksuella umhvørvinum, og sum endaði við, at Chua Soi Lek viðgekk, at hann var maðurin á myndunum. Kvinnuligi partnarin er ein góður vinur hansara. Avdúkingin kann fara at kosta flokki hansara politisku maktina seinni á árinum, men kortini ætlar Chua Soi Lek sær ikki at leggja frá sær, skriva donsk bløð.



## Murphy giftur – aftur

Amerikanski sjónleikarin Eddie Murphy er giftur á einari privatari oyggj í Fronskum Polynesien. Einir 25 gestir tóku lut í seremoniini, tá hann týsdagin segði ja við filmsframleiðaran Tracey Edmonds á oynni Bora Bora 230 fjórðingar í ein útnyrðing út Tahiti, skrivar blaðið People Magazine. Murphy varð skildur eftir 13 ára hjúnarskap við Nicole í 2006. Tey eiga fimm børn. Men Eddie Murphy gjørdist pápi aftur í fjør, tá hann fekk barn við Melanie Brown frá Spice Girls.

# Ringt at missa januar

**Januar mánaði í fjør royndist væl hjá nógvum djúpvatnstrolarum, og tað verður harmiligt, um skipini missa hesa tíðina orsakað av verkfalli, heldur Mikkjal Hammer úr Hvalba**

FISKIVEIÐI

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Sjagaklettur er ein av djúpvatnstrolarunum, sum hevði eitt brúkiligt ár í fjør*

Tað er, sum tað er vant í fiskiflotanum: Fiskiskapurin roynist ójavnt hjá ymsu skipabólkunum og millum skip í sama bólki.

Fiskimannafelagið ger á hvørjum ári upp hagtølini yvir ymsu skipabólkarnar, men lata ikki hagtøl yvir einstøku skipini út til almenningin. Hetta hevur komið teimum í trupulleikar fyrr, og tí verður mett betur at binda um heilan fingur.

Hesi hagtølini eru ikki fullfíggjað enn, sum eyðvitað er, men tey geva kortini eina greiða ábending um, at árið í fjør sum heild vignaðist verri enn árið fyri. Og tað er galdandi fyri allar skipabólkar.

Ikki tí, í flestu førum er inntøkan pr. dag hjá summum skipabólkum størri enn árið fyri, og kemst hetta av, at skipini hava færri dagar í sjónum. Men enn einaferð skal undirstrikast, at hagtølini fyri 2007 ikki eru fullfíggjað.

2006 var eitt óvanliga gott ár fyri verksmiðjutrolararnar. Tá var manningarparturin fyri dekkarar í meðal 890.000 krónur. Men hetta skal roknast yvir 337 dagar í sjónum, sum svarar til 2641 krónur fyri hvønn sjódag.

Fyribils tølini fyri 2007 vísa, at meðal inntøkan hjá hesum manningum er 620.000 krónur, men við einari dagligari inntøku upp á 3318 krónur pr. sjódag. Hetta er tó bert fyri 187 dagar í sjónum.

### Framgongd

Fyribils hagtølini hjá Fiskimannafelagnum vísa eina rímiliga framgongd í inntøkunum hjá limum felagsins, um hugt verður eftir inntøku pr. dag í sjónum.

Hjá djúpvatnstrolarum er talan um eina lítla framgongd, frá 1779 til 1801 krónur pr. dag. Hjá línuskipum er vøksturin størri, frá 1464 til 1739 krónur, sum svarar til 19%.

Hjá verksmiðjutrolarunum var vøksturin sum nevnt frá 2641 til 3318 krónur pr. sjódag, og fyri garnaskip sæst ein lítil vøkstur frá 1742 upp í 1783 krónur pr. sjódag.

Einasti skipabólkur, sum hevur eina afturgongd í inntøkunum, er smáir ísfiskatrolarar. Har er talan um eina minking úr 1948 niður í 1647 krónur pr. dag, og svarar hetta til 15%.

Ein av teimum drúgvu við Hvalbiartrolarunum er Mikkjal Hammer, og hann heldur, at árið hevur roynst hampiliga.

- Tað er nøkurlunda tað sama sum í fjør. Steintór var á beding í tríggjar mánaðir, so hjá honum hevur tað verið heldur lakari, men samanlagt hevur tað verið brúkiligt, sigur Mikkjal Hammer.

Hjá Hvalbiartrolarunum er støðan hon, at manningarnar sjálvar eiga skipini, og tí eru teir í løtuni í einari undarligari støðu, tí teir eru á ein hátt í verkfalli móti sær sjálvum. Og tað er ein óheppin støða, heldur Mikkjal Hammer.

- Januar mánaði plagar at roynast væl, og vit plaga altíð at byrja tíðliga. Tí verður tað harmiligt, um vit missa hesa tíðina. Vit mugu so bara síggja tíðina ann fyri fyrst, men tað er klárt, at gongur long tíð, mugu vit umhugsa, hvat frægast er at gera, sigur Mikkjal Hammer úr Hvalba.

# Leiðarin í Trivnaðartænastuni sagt upp

**Aftaná trý ár í starvi, hevur Jóanes N. Dalsgaard, leiðari fyri Trivnaðartænastuna undir Nærverkinum, valt at siga seg úr starvi**

HEILSUMÁL

*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Trivnaðartænastan undir Nærverkinum, sum hevur ábyrgdina av dag- og døgntilboðum til vaksin menningartarnað, hevur eini 400 fólk í starvi.

– Upprunaliga setti eg mær fyri at fáa betri dygd fyri somu játtan. Men eg má viðganga, at hetta havi eg ikki megnað, sigur Jóanes N. Dalsgaard, ið ikki hevur annað fast starv á hondini.

- Eg eri typan, sum vil hava ting at henda, og her er ov lítið hent. Eg ynskti at effektivisera og rationalisera fyri at fáa meira góðsku fyri somu pengar. Nú kann onkur annar taka yvir - antin ein, sum megnar hesa uppgávuna betur enn eg, ella ein, sum góðtekur støðuna, sum hon er.

Jóanes N. Dalsgaard, sigur við Sosialin, at higartil hevur arbeiðið snúð seg um at fáa pengarnar at strekkja til.

- Tá er púra vónleyst at budgetera og at leggja langtíðarætlanir, sigur hann, sum eisini heldur tað vera ein trupulleika, at hóast tað ikki hava verið beinleiðis niðurskerjingar á økinum, so hevur játtanin ikki tikið hædd fyri reguleringum ella svarað til reella prístalsvøksturin.

- Eftir mínum tykki er tørvur á einari umfatandi umskipan av økinum. Men tað hevði kravt eina munandi styrking av sentralu umsitingini hjá Trivnaðartænastuni, sigur hann.

Fráfarandi leiðarin fer nú at seta á stovn egið virki, har hann fer at bjóða seg fram sum ráðgeva og undirvísara, eitt nú innan HR-menning.

- Eg rými ikki úr Nærverkinum, men eg havi aðrar spennandi ætlanir, sum eg heldur vil savna meg um, sigur 37 ára gamli stjórnmálafrøðingurin, sum fer frá 1. februar.



*Leiðarin fyri Trivnaðartænastuna, Jóanes N. Dalsgaard hevur sagt seg úr starvi*